# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | OYS/SJ |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at um- og útbyggja eftirskúlan Rásin**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri, at eftirskúlin Rásin verður umbygdur og útbygdur.
*Stk. 2.* Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 25 mió. kr., íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Skúlatilboðið Rásin er eitt heildartilboð til ung við menningartarni, ið eru liðug við fólkaskúlan. Skúlatilboðið skal geva næmingum møguleika at førleikamenna seg til lestrar- og arbeiðslívið, og eftir lokið skúlaskeið eru næmingarnir klárir at fara á evt. serbreyt og/ella vart arbeiði, og megna somuleiðis at flyta heimanífrá til eitt tillagað bútilboð frá Almannaverkinum, og til at liva eitt so sjálvstøðugt lív sum gjørligt.

Sambært § 3, 2. pkt. í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 22. mai 2015, skal upptøka til skúlan fara fram á hvørjum ári. Fyri at upptøka kann fara fram á hvørjum ári, má pláss vera fyri fleiri næmingum afturat á skúlanum. Karmarnir í skúlatilboðnum skulu tí víðkast, og hetta krevur eina umbygging og útbygging. Ætlanin er, at skúlin skal hava 7 kømur afturat, í alt 14 kømur.

Rásin heldur til í einum sethúsum í Saltangará, sum fyrr eru umbygd og umvæld til virksemi hjá eftirskúlanum. Sum ein alternativ loysn hevur verið umrøtt at byggja nýggj hølir til skúlan, við aðrari staðseting. Umboð fyri skúlan hava tó mælt til, at hildið verður fast við verandi staðseting, tí liggur Rásin sentralt í býnum, við stuttari frástøðu til m.a. bussteðgistøð, krambúðir, mentunartilboð og annað, ið hoyrir einum býi til, og verður hetta mett at hava týdning í mun til tað endamál, ið Rásin skal virka eftir. Mælt verður tískil til, at hildið verður fast við verandi staðseting.

Í verandi bygningi verða ikki gjørdar størri umvælingar við verkætlanini. Tó skulu trý rúm broytast, eitt kamar skal flytast har, sum ein loftstova er í dag, til tess at gera pláss fyri einum vaskirúmið, ið verður samanknýtt við nýggja køkin. Bygt verður ein nýggjur bygningur omanfyri verandi bygning. Hesin er í tveimum hæddum við kamarslon á ovaru hæddini og undirvísingarhølum og felagshølum á niðaru hæddini. Ein millumbygningur verður bygdur, ið knýtir gamla og nýggja bygningin saman. Í hesum millumbygningi verður m.a. nýggjur køkur gjørdur.

Eisini skal nakað av arbeiði gerast við øki uttanum bygningin, eitt nú at fáa til vega størri parkeringsøki.

Nýggi bygningurin er 450 fermetrar til víddar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóggáva er viðvíkjandi um- og útbygging av Rásini í Saltangará.

Viðvíkjandi rakstrinum av Rásini verður víst til løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 87 frá 22. mai 2015.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at heimila landsstýrismanninum at nýta upp til 25 mió. kr. til verkætlanina at um- og útbyggja Rásina í Saltangará.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lógaruppskotið er ein neyðugur liður til tess at um- og útbyggja eftirskúlan Rásin í Saltangará, soleiðis at pláss verður fyri fleiri næmingum afturat á skúlanum, og at upptøka av næmingum kann fara fram á hvørjum ári. Hetta fyri betur at kunna nøkta eftirspurninginum eftir tílíkum eftirskúlatilboðum.

Tá um- og útbyggingin er liðug verða karmarnir víðkaðir soleiðis, at tvífalt so nógvir næmingar rúmast á skúlanum, ið er frá 7 næmingum til 14 næmingar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá eftirskúlanum Rásin, Landsverk og Fíggjarmálaráðnum.

Hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Verkætlanin hevur verið bjóða út, og við støði í innkomnu tilboðunum, metir Landsverk at samlaði byggikostnaðurin verður í alt 25 mió. kr., írokna prosjektering, ráðgeving, innbúgv.

Frá 2019 til 2022 eru brúktar 1,65 mió. kr. til fyrireiking og projektering av verkætlanini. Játtaðar eru 4,5 mió. kr. í 2022, ið verða fluttar fram til 2023. Landsverk mælir til at írestandi útreiðslur fella soleiðis yvir ár: 12 mió. kr. í 2023, 12,35 mió. kr. í 2024, men annars verður verkætlanin framd sambært veittari játtan á fíggjarlógini.

Tá talan er um fleiri fermetrar, fleiri næmingar og upptøku á hvørjum árið, koma rakstrarútreiðslurnar hjá Rásini at økjast munandi, eftir at útbyggingin er framd. Mett verður, at raksturin kemur at økjast við umleið 3 mió. kr. árliga.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at uppskotið ber í sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunu.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið ber við sær økt virksemi fyri byggivinnuna í byggitíðarskeiðinum.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Bygningurin verður bygdur samsvarandi galdandi regluverkið innan bygging, og sum fyriheldur seg til ávísa burðardygd í bygging.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Útbyggingin av eftirskúlanum Rásini kemur at geva økt virksemi í nærumhvørvinum, bæði í byggitíðarskeiðnum og ikki minst, tá um- og útbyggingin verður liðug við tað at fleiri starvsfólk og fleiri næmingar koma at vera knýttir at skúlanum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Við útbyggingini fáa ung við serligum tørvi, ið eru liðug við fólkaskúlan, munandi betur skúlatilboð

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakrar millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið er í samsvar við sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi einstaklinga, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ongar kendar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp til 25 mió. kr. til at um- og útbyggja Rásina í Saltangará. Tað er Landsverk, ið vegna landsstýrismannin, sum fær verkætlanina og játtanina at umsita.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Ja | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| avtalur og reglur | | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Í fyrsta stykki verður ásett heimild hjá landsstýrismanninum at skipa fyri, at eftirskúlin Rásin verður um- og útbygdur. Hetta við bakstøði í, at upptøka á Rásini, sbrt. § 3 í løgtingslóg nr. 67 frá 2. mai 2003 um skúlatilboð til ung við breki, skal fara fram á hvørjum ári. Til tað krevst, at pláss er fyri fleiri næmingum á skúlanum, og tí eisini at karmarnir á skúlanum verða víðkaðir.

Ásett er í stykki 2, at samlaði kostnaðurin í mesta lagi kann verða 25 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

**Til § 2**
Løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Lógin fer úr gildi 1. januar 2026, tá ið samtykta játtanarskeiðið er av og umbyggingin og útbyggingin væntandi er liðug.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting.

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá eftirskúlanum Rásin
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Landsverk
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum